

# Oljuprísurin: Letur seg ikki gera at gita nær lækkingin er komin á botn

**Jógvan Hugo Gardar**

18.12.2014 - 08:39

Oljan.fo

Ein oljugreinari kallar metingarnar av nær oljuprísurin er komin á botn, er sum at royna at lofta einum knívi í leysari luft.

Oljuprísirnir eru á leið tað sama í morgun, sum teir vóru aftaná eina lítla hækking í gjár, skrivar TDN Finans. Bæði norðsjóvaroljan Brent og amerikanska lættoljan, WTI, verður í morgun seldt fyri eitt vet hægri prísir enn tá evropeisku keypsskálarnir stongdu í gjár.

Sveiggini í prísinum í gjár vóru merkt av at marknaðurin bíðaði eftir einum endaligum svari frá Iran um landið velur at fylgja hinum OPEC-londunum, og ikki minka um sína oljuframleiðslu.

Boðini frá iranska oljumálaráðharranum, Bijan Namdar Zanganeh, vóru týðulig. Hann segði at Iran ikki kemur at minka um sína oljuframleiðslu undir nøkrum umstøðum, havandi í huga handilsforðingarnar sum hesu seinnu árini hava skert handlinum við umheimin munandi.

Amerikanska ráðgevingar- og metingarfyritøkan Frost & Sullivan metir at tann nýggi veruleikin verður ein oljuprísur sum kemur at liggja á einum lægri prísi enn vit hava verið von við farnu árini.

Stjórin fyri olju- og gassdeildini í felagnum, Carl Larry, sigur í samrøðu við Bloomberg News, at øll OPEC-londini í løtuni royna at selja meir olju til Kina, tí tey meta tað trupult at fáa fatur á niorðuramerikansku oljukeyparunum, ið eru farnir at keypa bíligari amerikanska olju, ið floymir inn á marknaðin fyri tíðina.

Millum greinarar er stór óvissa, men fleiri eru farnir at halda at príslegan kann koma at liggja á leið har hon er í dag, tað vil siga nakað omanfyri 60 dollarar fatið fyri norðsjóvaroljuna, og nakað undir 60 dollarar fyri amerikansku lættoljuna. Vandin fyri at prísurin lækkar munandi skal í løtuni vera minni nú.

Chip Hodge, ið umsitir oljuíløgur hjá John Hancock Life Insurance Company, er tó meir í iva, og heldur at oljuprísurin kann fara báðar vegir.

- At gita nær oljuprísurin er komin á botn, er sum at lofta einum knívi í leysum lofti, sigur hann í samrøðu við Bloomberg News.

Munurin millum norðsjóvaroljuna Brent og amerikansku lættoljuna WTI minkaði í gjár við 90 cent. Eitt fat av WTI-oljuni, ið skal latast keypara í januar, kostar í morgun 56,28 dollarar, og hetta er 19 cent lægri enn tá marknaðurin stongdi í gjár.

Í morgun fór eitt fat av Brent, ið skal latast keypara í februar, fyri 61,21 dollarar. Tað eru 3 cent meir enn tá marknaðurin stongdi í gjár